**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 6 |
| Tíð: | 22-04-21 kl. 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.
Tá lá ikki fyri hjá Katrini Holm at møta. Í hennara stað møtti Ingigerð á Trøðni, fyrstvaldi varalimur.

**Fundarskrá:**

1. Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn
2. Evni til fund við borgarstjóran tann 26 mai
3. Túrur til Vágs, kunning um lutaíbúðir
4. Ymiskt

<u>AD 1 Góðkenning av seinastu fundarfrágreiðing</u>

Fundarfrágreiðing #5 var góðkend.

<u>AD 2 Evni til fund við borgarstjóran tann 26 mai</u>

Her eru nøkur av teimum málum, Eldraráðið metir sum hjartamál:

- Bústaðarviðurskifti
- Tættari samstarv við býráðið, serliga eldranevndina og trivnaðarnevndina
- Tilhaldið opið um kvøldarnar. Skipan av tiltøkum av áhuga fyri eldra ættarliðið
- Demensøkið og heimahjálpin, herundir viðurskifti og tørv hjá óhjálpnum borgarum 60-67 ár
- Bíðilistar
- Venjingarmøguleikar fyri eldri
- Atkomumøguleikar fyri eldri og rørslutarnað
- Lendisgøtur
- Eina grønari kommunu (trøð, endurnýtsla etc)
- Bussleiðin
- Størri samskifti við bygdir og oyggjar av hóskandi stødd innan kommunumarkið

Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

<u>AD 3 Túrur til Vágs, kunning um lutaíbúðir</u>

Ætlanin er at vitja Vágs kommunu og hoyra meira um teirra ætlanir við lutaíbúðum.
Vágsbygd er kommuna við undir 1500 íbúgvum. Aðrar kommunur, sum til dømis Tofta kommuna og Eysturkommuna hava somuleiðis ætlanir um lutaíbúðir, sum kann vera ein háttur, sum tiltalar eldra ættarliðið - sum sita í ofta alt ov stórum húsum -, at skifta til egnaðar lutaíbúðir.
Ein slík loysn hevði skapt størri møguleikar hjá yngri fólkum at fingið tak yvir høvdið.

<u>AD 4 Ymiskt</u>

Fundarfrágreiðing frá TK um fundin 27. januar 2021 er endaliga komin okkum í hendi. Hon er lisin og goðkend.

Hóast Eldraráðið ikki viðgerð persónsmál, hendir tað meira enn so, at Eldraráðið fær kunnleika til persónsmál, har alt ikki gongur eftir vild. Slík mál níva Eldraráðið almikið.

Eins og fráfarna Eldraráðið hevði frammi, so meta vit, at tey, sum eru um okkara gomlu mugu fáa neyðuga útbúgving í høvuðsstaðnum. Hetta tí kanning millum ófaklærd í Heilsu og Umsorgnartænastuni vísti, at tað er ein stórur hópur, sum gjarna vil útbúgva seg, men ikki hættar sær suður til Hovs.

Tórshavnar Kommuna hevur roynt at fingið politisku skipanina at góðtaka eina útbúgving av heilsuhjáparum og -røktarum í høvuðsstaðnum sum eina neyðloysn til at førleikamenna tey, sum starvast í røktini og hava við røkt at gera. Alt ov mong ófaklærd manna starvshópin. Tað má leggjast trýst á politisku skipanina, so útbúgvingin kann fara fram í høvuðstaðnum, til tørvurin av faklærdum fólki er nøktaður. Útskiftingin av starvsfólki er alt ov stór. Hinvegin skal sigast, at vit eisini hoyra um sólskinssøgur, har búfólk stórtrívast.

Torshavnar Kommuna eigur at umhugsa at stovnseta eitt verkstað til eldri, sum er uttanfyri Tilhaldið, har fleiri fólk enn í dag kunnu hugna sær við veving, binding, at skera í horn, bókaklubbar o.s.fr.

Fundur lokin klokkan 14:30.

Næsti fundur verður hósdagin 6. mai klokkan 13 í Tilhaldinum.
Sigi frá í góðari tið, um tað ikki liggur fyri at møta.

Tórshavn 23. Apríl 2021.

Petur Rouch,
skrivari